SKJAL 6

STRANDFARASKIP LANDSINS

Prenta - Lat aftur

**Reglugerð fyri Strandfaraskip Landsins**

**I. Bygnaður**

**§ 1.** Strandfaraskip Landsins er landsfyritøka undir Føroya Landsstýri.
Stk. 2. Landsstýrið ásetur tær reglur, sum til eina og hvørja tíð skulu galda fyri virksemið í fyritøkuni.
Stk. 3. Virksemið ella partar av hesum kann verða skipað í partafelag. Stjórin leggur uppskot um stovnan av slíkum feløgum fyri landstýrið.

**II. Uppgávur**

**§ 2.** Fyritøkan hevur til uppgávu at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan kann harafturat taka lut í uttanlanda fólka- og farmaflutningi.
Stk. 2. Fyritøkan skal í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði.
§ 3. Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanir, ferðaætlanir og takstpolitikkur verður skipað í 4-ára ætlanum, sum á hvørjum ári verða endurskoðaðar og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar í seinasta lagi 1. apríl.

**III. Leiðsla**

**§ 4.** Landsstýrið setur stjóran, ið hevur dagligu fíggjarligu- og fyrisitingarligu ábyrgdina av allari fyritøkuni og eisini ábyrgd av øllum virksemi í fyritøkuni mótvegis landsstýrinum.
Stk. 2. Stjórin setur og loysir úr starvi øll starvsfólk í fyritøkuni sambært galdandi reglum.
Stk. 3. Stjórin hevur ábyrgdina av, at virksemið í fyritøkuni verður stjórnað samsvarandi hesum reglum og annars í samsvari við reglurnar í fyritøkuni og lóggávuni annars.
Stk. 4. Fyritøkan verður bundin við undirskrift stjórans, har annað ikki er ásett í reglugerð ella við lóg.
Stk. 5. Stjórin kann geva ávísum starvsfólkum prokura, ið verður fráboðað landsstýrinum.

**IV. Roknskaparverk**

**§ 5.** Fyritøkan hevur egnan roknskap, sum verður grannskoðaður av ríkisgóðkendum grannskoðara og síðani lagdur fyri landsstýrið til góðkenningar sambært ásetingum fyri almennar roknskapir.

**V. Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi 1. januar 1997.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi landsstýrisins reglugerð um Strandferðsluna frá 14. november 1992.

Tórshavn tann 22. januar 1997

Føroya Landsstýri

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður